Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Tórshavn, 6. februar 2024

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøters gøta 7
100 Tórshavn

Viðmerkingar til uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur sent Undirvísingarstýrinum uppskot um broyting av § 20 í fólkaskúlalógini um næmingtal í hvørjum flokki til ummælis.

Undirvísingarstýrið hevur hesar viðmerkingar:

Grundleggjandi viðmerkingar

Undirvísingarstýrið tekur undir við broytingini, at lækka hámarkið fyri næmingum í flokkunum niður í 20 næmingar. Lógaruppskotið er í sær sjálvum eitt gott stig at taka, ið eigur at geva øllum pørtum betri fortreytir at náa settum málum og skapa trivnað.

Broytingin hevur tó nakar tíðandi ávirkanir, ið bæði land og kommunur mugu fyrihalda seg til og skaffa neyðuga figgjarliga og hølisligu fortreytirnar til.

Broytingin í lógini fer at gera, at flokkarnir í størru skúlunum í Føroyum fara at vera smærri og fleiri. Broytingin í lógini hevur onga ávirkan á smærru og miðalstóru skúlarnar, sum ikki røkka 20 næmingum í hvørjum árgangi

Undirvísingarstýrið ynskir tó at vísa á, at tað eigur at vera umhugsa eitt lægra mark eisini. Í verandi skúlaskipan er tað nærum helmingurin av øllum skúlunum, sum hava 10 næmingar ella færri í hvørjum árgangi.

Undirvísingarstýrið mælir landsstýrismanninum at taka hetta við í arbeiðið, nú mest loyvda næmingatalið ætlandi verður broytt, so eitt minsta næmingatal eisini verður ásett.

Játtanarskipanin og møgulig endurskoðan

Játtanarskipan í lógaruppskotinum
Undirvísingarstýrið metir ikki, at játtanarskipanin eigur at verða umrødd ella skipað beinleiðis í lógini um fólkaskúlan. Fyri tað fyrsta er tað ikki skynsamt, at broyta ein brotpart av játtanarskipanini við lóg, men ikki restina av játtanarskipanini. Harnæst hevur játtanarskipanin higartil ikki verið lógarregulera, og verður tað heldur ikki mett at hoyra heima í einari lóg. Tað er ikki skynsamt, tí tað verður ov stirvið, um lógin skal broytast hvørja fer man ynskir at gera smávegis broytingar í játtanarskipanini. Vit vilja mæla til, at allar

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Tórshavn, 6. februar 2024

orðingar í viðmerkingunum til lógaruppskotið, ið broyta verandi játtanarskipan, verða strikaðar. Lógin eigur at fyrihalda seg til broytingina av floksstøddini, og skal verandi játtanarskipan í staðin endurskoðast serskilt.

Endurskoðan av verandi játtanarskipan
Lógaruppskotið leggur upp til, at játtanin framhaldandi verður grundað á flokkatal og ikki t.d. játtan fyri hvønn næming. Avleiðingin av tí er, at tey lýti, ið eru í verandi játtanarskipan verða enn sjónligari og enn víðfevndari. Undirvísingarstýrið hevur sett á skrá, at játtanarskipanin eigur at verða enduskoðað, og undirstrikar lógaruppskotið henda tørv. Játtanarskipanin má tillagast soleiðis, at hon sum best loftar ynskinum um ávíst mesta næmingatal í hvørjum flokki uttan at skapa órógv í skúlunum.

Í hesi endurskoðan eigur at verða komið inn á nógv ymisk viðurskifti, sum øll kunnu virka fyri, at játtanin ár undan ári gerst tryggari hjá allari skúlaskipanini.

Vit mæla til at vera víðskygd í hesum arbeiðinum og fara víða og m.a. viðgera:

- At skipa og samskipa størri skúlaeindir
- At skipa nøkur skúlaøki tvørtur um kommunur
- At greina um lægri næmingatal í flokkunum gevur minni tørv á miðfirraðari serundirvísing ella øðrum sernámsfrøðiligum átøkum.
- At endurskoða aðrar tættir í verandi lóg og játtanarskipan, og ikki bara hámarkið í hvørjum flokki m.a.:
    - Tímatal í hvørjum árgangi
    - Fak og fakbýti
    - Tvílæraraskipan (t.d. tvílærararskipanin í 1. og 2. flokki)
    - Førleikastovu
    - Miðfirraða serundirvísing
    - O.s.fr.

Fyrisitingarligar avleiðingar
Í verandi játtanarskipan er tað so, at tað í einum vanligum flokki í mesta lagi eru 24 næmingar. Um næmingatalið er 25 ella 26 næmingar, so verða eyka tímar játtaðir. Flokkar verða ikki býttir sundur, fyrr enn næmingatalið fer upp á 27 næmingar. Her er eitt gyrði, ið hevur verið brúkt síðani 2002. Henda skipan fellur burtur, um lógin kemur í gildi, og játtanin verður framyvir grundað á tveir flokkar, tá ið næmingatalið fer upp um 20, tríggir flokkar, tá ið næmingatalið fer upp um 40, o.s.fr. Hetta seinasta kemur greitt fram í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Tað, ið verður lagt upp til í lógaruppskotinum, er fyrisitingarliga uppá nógvar mátar lættari at hava við at gera, enn verandi skipan. Men tað fer eisini at raka meinari og víðari hjá nógvum skúlum í landinum, tí tað eru nógv fleiri skúlar, ið kunnu koma í støðuna, at svinga millum 20 og 21 næmingar, enn tað í dag eru skúlar, ið svinga millum 26 og 27 næmingar. “Svingskúlarnir” verða tí fleiri, og játtanin verður meiri viðbrekin hjá fleiri skúlum enn hon er nú. Ein hugsað avleiðing av uppskotinum er, at:

- Skúli A við 20 næmingum í hvørjum árgangi fær játtan til 9 flokkar frá 1. – 9. flokk
- Skúli B við 21 næmingum í hvørjum árgangi fær játtan til 18 flokkar frá 1. – 9. flokk

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Tórshavn, 6. februar 2024

Skúli B er tvær ferðir so dýrur at reka, hóast hann bara hevur 9 næmingar fleiri enn skúli A.

Broytingin kann eisini fáa avleiðingar fyri starvsfólkini. Hugsast kann, at uppskotið kann hava við sær fleiri tíðaravmarkaðar setanir á fólkaskúlaøkinum, enn tað eru í forvegin, sum ikki er ynskiligt.

Viðmerking til brotið um "Fíggjarligar avleiðingar"
Lógaruppskotið leggur upp til, at ein flokkur verður býttur sundur ella at tað verða settar aðrar fyriskipanir í verk, tá ið næmingatalið í einum flokki fer 1 næming upp um 20. Hetta kemur greitt fram í viðmerkingunum til lógaruppskotið, m.a. undir pkt. *1.4 Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum* og í serligu viðmerkingunum.

Tað er ein broyting, ið skal fíggjast, og við verandi framrokningum, svarar hetta sambært Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til áleið 4 mió. kr. hvørt ár tey næstu 9 skúlaárini frá skúlaárinum 2025/26 at rokna.

Útrokningar í tilmælinum frá arbeiðsbólki um broytingar í Fólkaskúlalógina eru endurgivnar í hesum lógaruppskoti. Neyðugt er tí eisini at nevna *fyritreytirnar* fyri hesum útrokningum.

Útrokningin í tilmælinum er grundað á:

1. Næmingatølini skúlaárið 2022-23 har roknað verður við sjeyflokkaðum skúlum, sum eru skúlar, ið hava fleiri enn 114 næmingar í 1.-7. flokki og sostatt eru fult floksbýttir
2. Tvílæraraskipan sum í dag
3. P-fak (handaligar lærugreinar) sum í dag
4. Meirútreiðslan er roknað sum: munur á pultstímum býtt við 24t. = mett ársverk * 500 t. kr.

Í útrokningini í tilmælinum er ikki tikið hædd fyri:

- broytingum, sum møguliga skulu gerast fyri 1. flokkaðir til 6. flokkaðir skúlar, sum fáa samanlagdar flokkar, sum verða størri enn 20 næmingar samanlagt,
- lønarhækkingum, sum hava verið síðani 2022
- at kostnaðurin er mettur út frá útrokning fyri øll 9 árini býtt við 9 flokkum. Hvat meirútreiðslan verður fyrst árið er ikki givið við hesi miðalútrokning. Í 1. flokki er tvílæraraskipan, sum í stóran mun fellur burtur um skipanin við 20 næmingum í hvørjum flokki verður sett í verk.

Undirvísingarstýrið metir, at tað ikki er rætt at nevna upphæddir í lógaruppskotinum, uttan at nevna hesi viðurskifti.

Økti fíggingartørvurin er grundaður á fult flokkaðar skúlar. Tað eru skúlar, sum hava minst ein flokk hvønn árgang og ikki hava samlestur tvørtur um árgangir. Útrokningin leggur tískil ikki upp fyri, at tað kunnu vera skúlar, sum hava samlestur tvørtur um árgangir, og tá koma upp um 20 næmingar tilsamans. Fíggjarliga útreiðslan kann tí vera nakað hægri enn mett.

Fíggingin má vera til taks til fíggjarlógina 2025 (fyri 5 mánaðir frá 1. august 2025 at rokna), fyri at fremja uppskotið og á fylgjandi fíggjarlógum til lógarbroytingin er rullað fult út, við eini meirútreiðslu á uml. 4 mió.

Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Tórshavn, 6. februar 2024

kr. hvørt fíggjarár, til skipanin er rullað út til allar 9 árgangirnar, ið lógaruppskotið fevnir um, soleiðis at játtanin er 36 mio. kr. hægri í 2031 enn í 2022, alt annað líka.

Kommunurnar koma at hava avbjóðingar viðv. hølum, men Undirvísingarstýrið fær ikki úttalað seg um, hvørt hesar avbjóðingar eru møguligar at lyfta ella ikki.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið (pkt. 2.1.) stendur:
"Fyri landið kemur hetta at kosta umleið 4 mió. kr. um árið frá 2025 og tey fylgjandi nýggju árini tvs. tilsamans umleið 36 mió. kr."

Her átti at staðið: *Samlaða eyka útreiðslan av lógaruppsktinum, tá ið 9 ár eru farin,* ***er 36 mió. kr. um árið***. Og ikki 36 mió. kr. tilsamans, sum tað stendur í lógaruppskotinum. Tá er hædd ikki tikin fyri lønarvøkstri.

Burðardygd og varandi haldføri
Samlaða eyka útreiðslan av lógaruppsktinum, tá ið 9 ár eru farin, er 36 mió. kr. um árið. Og ikki 36 mió. kr. tilsamans, sum tað stendur í lógaruppskotinum. Hetta fer alt til lønir, og svarar tað til 60-70 ársverk. Hesi ársverk eru ikki til í løtuni, og skulu mannast upp við so nógvum eyka starvsfólkum til skúlaverkið. Tað eigur at verða umhugsað, at taka fleiri námsfrøði- og læraralesandi inn á Setrið næstu árini.

Eitt stig sum hetta, at lækka mesta næmingatalið í hvørjum flokki, eigur tí at verða tikið saman við øðrum neyðugum umleggingum innan alt fólkaskúlaøkið, so øll tilgongdin er grundað á burðardygd og haldføri. Spurningurin um burðardygd og varandi haldføri eigur at verða viðgjørdur í hesum viðfangi.

Vinaliga,

Hjalmar Hansen